Sat fýra tímar vátur á helluni

Ein vágbingur rendi fríggjanáttina á Porkerisnes, og hann sat fýra tímar vátur og kaldur á helluni, til tyrlan hjá donsku sjóverjuni fann hann

Tað kundi verið galin endi hjá einum vágbingi, sum Kristi Himmalfaradag skuldi fara úr Havnini til Vágs einsamallur í báti.

Maðurin var júst komin aftur úr Grønlandi, og í Havn hevði hann keypt sær ein AWI 27 glastrevjabát, sum hann skuldi sigla suður.

Ferðina suður metti hann at taka fýra tímar.

Klokkan hálvgum fýra tíðina tosaði hann í sendaranum um Tórshavna Radio, og avtalan var at tosa aftur hálvan tíma seinni.

Men einki hoyrdist frá manninum, Tórshavn Radio fekk ikki samband við hann. Tí varð leiting sett í verk.

Ólavur Halgi var staddur norðanfyri Føroyar, og Tjaldrið stóð á skipasmiðjuni, so farið varð at leitað við Pride og útróðrarbátum.

Tá Teistin fór suður um kvøldið, hildu teir seg umborð hoyra onkran rópa, men teir sóu ongan, tí tað var so kølsvart í mjørka. Eisini var sjaskut í sjónum.

Út móti morgni fór tyrlan hjá donsku sjóverjuni á flog, og við Porkerisnes fekk tyrlumanningin eyga á ein bajrgingarbát.

Tá klokkan var stívliga hálvgum sjey fríggjamorgunin, kundi tyrlan boða frá, at hon hevði tikið ein mann upp av Porkerisnesi. Maðurin hevði tað gott og varð settur á land í Froðba.

Maðurin hevur greitt politinum frá, at á veg suður var alt gingið fyri umborð á bátinum. Motorurin bleiv í ólagi, radarin virkaði ikki, ei heldur sendarin.

Maðurin heldur, at hann er sovnaður, meðan hann sigldi spakuliga í mjørkanum. Hann vaknaði knappliga við ein brest, tá báturin rendi á land norðanvert Porkerisnes.

Hann leyp yvir borð, krøkti seg í taran og slapp upp á land.

Báturin sakk beinanvegin.

Ikki fekk maðurin givið boð frá sær, tí hann slapp ikki upp av helluni.

Tyrlan fann mannin, tí bjargingarbáturin, sum var umborð á AWI-bátinum, blástist upp og var liggjandi har. Hann sást væl úr luftini.

Maðurin var drívvátur og kaldur, tá hann varð tikin upp, tí hann hevði sitið fýra tímar á helluni. Hann kom tó beinanvegin fyri seg, sigur politiið í Suðuroynni.

randi

Mugu hava semingsmann

Samráðingarnar millum Starvsmannafelgið og Tryggingarsambandið eru steðgaðar upp

Einki kom burtur úr samráðingarfundinum fríggjadagin millum Starvsmannafelagið og Tryggingarsambandið.

Fundurin vardi eitt hálvt samdøgur, men har var einki at gera, og niðurstøðan var tí, at neyðugt var at senda boð eftir semingsmanni.

Nú leita partarnar so eftir onkrum fólki, sum er til reiðar at royna at fáa semju.

Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum, sigur, at langi er eftir á mál, um enn okkurt smávegis eru teir samdir um. Krøvini til nýggjan sáttmála eru fleiri, og eisini lønarspurningurin er eftir at avgreiða.

Tey høvdu væntað at skula samráðast alt vikuskifti, men nakað aftaná midnátt fríggjadagin var ikki til at koma víðari.

Samráðingarnar hava gingið seint, tí fólkini hava ikki havt stundir at samráðst.

Men nú skal tað so vera. Tá semingsmaður kemur uppí hevur hann átta dagar at arbeiða í, meðan eitt møguligt verkfall verður útsett.

Sáttmálin millum Starvsmannafelagið og Tryggingarsambandið gekkút 1. mars. Tað er vanligt, at tær samráðingarnar bíða, til Starvsmannafelagið hevur gjørt sáttmála við landsstýri.

Starvsmannafelagið fer í vikuni eisini at byrja samráðingarnar við SEV og við Klaksvíkar og Vágs kommunur.

randi

Tólv vóru á støðini

Stevnugestir munnu drekka líka nógv, sum teir altíð hava gjørt, men teir gera sjáldan longur nakað um seg.

Politiið í Klaksvík tók tó fýra mans, sum vóru harðligir og vildu berjast.

Tríggir bilførarar vórðu tiknir fyri at koyra við kenning.

Á stevnum eru altíð nøkur, sum drekka meira enn tey orka, og politiið tók fimm mans upp, sum vóru avdotnir. Hesir vórðu tiknir inn á støðina at sova.

Haraftrat vóru fleiri, sum ikki vóru gonugfør, og sum politiið so koyrdi heim, sigur Karsten Hansen, sýslumaður í Norðuroyggjum.

randi

Svumu í land

Tríggir ungir hc vnarmenn komu væl frá tí, tá bátur teirra fórst vestanfyri Kalsoynna

Teir tríggir havnarmenninir hava allir tilknýti til Kalsoynna og eru vanir at vera har um summarið.

Henda dagin, mikudagin í seinastu viku, fóru teir vestur um Kalsoynna eftir havhestaeggum.

Til stuttleikar fór ein teirra fór upp á Kalsfles, meðan hinir vóru eftir í bátinum.

Um middagsleitið steðgar báturin, og annar maðurin umborð roynir við ár at venda honum.


Samstundis royndi hin at fáa bátin í gongd aftur, men báturin bakkaði ikki, sum hann skuldi. Kervið var farið. Báturin fór so við nógvari ferð upp á Kalsoynna, hol kom á hann, hann sakk, og báðir menninir á bláman.

Teir svumu so báðir til lands. Tann triði, sum var á flesini, noyddist eisini at svimja til lands.

Ein fór út í aftur fyri at royna at bjarga bátinum. Tað eydnaðist ikki, og hann var eitt sindur illa fyri aftaná.

Tað var annar av hinum eisini, av krampa og kulda.

Men tann triði fór beinanvegin til gongu til Trøllanesar fyri at biðja um hjálp.



Kalsfles er norðast á Kalsoynni

Haðani fór fólk við klæðum og teppum, men tá vóru teir báðir komnir fyri seg aftur og vóru næstan komnir til Trøllanesar.

Karsten Hansen, sýslumaður í Norðuroyggjum, heldur ikki, at menninir kunnu lastast fyri at hava tikið sær óráð fyri. Teir eru vanir at vera í báti, og tað er vanligt at fara eftir havhestaeggum undir Geirhøvlinum.

Tað eru raskir dreingir, og teir vóru so skilagóðir, at teir allir vóru í bjargingarvesti. Annars kundi verið illa vorðið, heldur Karsten Hansen, sum sjálvur plagar at fara við báti, har hesir henda dagin vóru.

Stutt aftaná varð farið at leita eftir bátinum, men hann var farin við streymum.

randi

BYGDARHÚSIÐ í Hósvík

Sera hugnaligt og nossligt hús, við øllum hentleikum, bíliga til leigu til fundarvirksemi, veitslur, brúdleyp, føðingardagar o.a.

Steintoy er í húsinum og vit kunnu borðreiða fyri 300 fólkum í salinum.

Eisini leiga vit steintoy út.

BYGDARFELAGIÐ VARÐIN
Tlf. 22336

Fremmandafólk síggja heimavirki

Føroya Heimavirkisfelag hevur í summar hvørt týskvøld framsýning í Norðurlandahúsinum, samstundis sum har er Føroyakvøld

Føroya Heimavirkisfelag vendir sær aftur í summar beinleiis til fremmandafólkini, sum vitja.

Í staðin fyri bara at selja heimavirkað pløgg og heimavirkaðar lutir í handlum, fer felagið eins og í fjør eisini at hava framsýning í Norðurlandahúsinum hvørt kvøld. Tá eru har altíð nógv fremmandafólk, tí húsið hevur serliga skrá við føroyskari mentan og føroyskum mati.

Fyrsta týskvølds-framsýningin í Norðurlandahúsinum hjá Føroya Heimavirkisfelag er í kvøld, og framsýningin verður so hvørt týskvøld til út í august mánað. Framsýningin letur upp kl. 17.

Eini 40-50 hava virkað til framsýningina, sum verður sett saman av fjølbroyttum heimavirki. Pløgg og annað hondarbeiði, lutir úr viði, steini, horni og beini.

Fremmandafólk og onnur, sum koma í Norðurlandahúsið, kunnu keypa heimavirkaðu lutirnar.

Samstundis verður framsýningin við livandi heimavirki, t.v.s. at har sita fólk og virka.

randi



Vitjandi í Norðurlandahúsinum týskvøld fáa eisini høvi at siggja fólk sita og virka